Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Bíðilistar í Almannaverkinum

Spurningar:

1. Hvussu nógvir borgarar eru á bíðilista til ávikavist endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing, taluvenjing, góðu tilgongdina (heimaráðgeving), virknistilboð (vard verkstøð), Megna títt lív, stuðul, umlætting og bústað hjá Almannaverkinum?

Viðmerkingar:
Seinastu árini hevur verið arbeitt við viðgerðartrygd innan heilsuverkið. Tað er greitt, at um trygdin skal geva besta úrslitið, er neyðugt at borgarin hevur trygd fyri, at hann fær tænastu eftir lidna viðgerð í heilsuverkinum. Her kann t.d. nevnast endurvenjing, stuðul, umlætting, bústað v.m., ið viðkomandi hevur tørv á. Hesar tænastur eru millum annað í Almannaverkinum. Fyri at fáa innlit í núverandi støðuna viðvíkjandi bíðilistum á hesum økinum verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 27. oktober 2021

Jóhannis Joensen